gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

Miðbýurin - Hjarta í býnum

Jan Christiansen
Býráðslimur fyri fólkaflokkin

Ansast má eftir, at miðbýurin ikki minnur um eitt tannleyst gebiss.

Ein og hvør býður, við viðring fyri sær sjálvum, roynir at hjúkla um hjarnina av býnum. Miðbýurin, har alt er sprottið út frá, setur sín dám á býarmyndina og er eitt savningarstað hjá fólki.

Soleiðis er eisini í Havn. Tað er niðri á Vaglinum, fólkið savnast tá eitthvørt hátíðarhald verður hildið. M.a. er Vaglið miðpunktið á Ólavsøku, Grækarismessu, Flaggdagin og til 1. mai dagshaldið.

Men er tað nokk? Kann ein miðbýur yvirliva við bert at vera karmur um hátíðarløtur?

Mítt svar er avgjørt nei! Um Miðbýurin framhaldandi skal verða staðið har fólk vitja, má miðbýurin hava nakað at bjóða allar 365 dagarnar um árið. Tað nyttar lítið at taka burtur eitt hús fyri og annað eftir, fyri at leggja ein grønan plett ella fyri at geva pláss fyri trimum bilum. Tá kemur kjarnar av býnum at minna um eitt tannleyst gebiss.

Umráðandi er, at borgarin tímur at koma í miðbýin, eisini tá tað regnar og tá kalt er. Okkurt má vera í hjartanum á býnum, ið dregur. Hjartað er hitamiðdepulin í kroppinum, og soleiðis eigur okkara miðbýur eisini at vera.

Har mugu vera handlar og tænastustøð. Har eigur at vera matstøð og caféir. Mentunarstøð og sjónleikur, osfr.

Fyri at geva rúmd fyri hesum, í miðbýnum, eigur eitt komandi býráð at gera eina miðbýar ætlan. Henda ætlan skal verða gjørd í tøttum samstarvi við tey, sum í dag húsast í miðbýnum. Nýggjar ásetingar eiga at verða gjørdar, so at framtíðarbyggin í miðbýnum er við til at fjálga um og er við til at geva býnum lív og hita. Ansast má eftir, at hugnin og vakurleikin í býnum verður varveittur.

Kommunan kundi byrja við at hampa og fríðka hjá sær sjálvum. Ikki kann sigast, at húsini á Glade Hjørn, ið kommunan eigur, er nakað prýði fyri býin.

Hvat er týdningarmiklari - niðurgjalding av kommunalari skuld ella røtt raðfesting?

Jenis av Rana



Øll munnu vit kenna til byrðuna av skuld og dreymin um skjótast gjørligt at kunna minka hesa og vinna størst fíggjarligt frælsi.

Tú kennir tað frá tí dagliga húsarhaldinum, landspolitikkarar kenna tað frá landshúsarhaldinum, og støðan er júst hin sama við húsarhaldunum í kommunum okkara.

Poul Nyrup Rasmussen, danski forsætisráðharrin, staðfesti, at Landsstýrið hevði megnað at lagt pening til síðis og niðurgoldið skuld, og hann metti hetta at verða framúr positivt. Men hann nevndi ikki, at prísurin var eitt niðurslitið samfelag.

Áttu týdningarmikil communal øki at verði lýst í undantaksstøðu?

Farandi bý(ði)ráð rósar sær av, at hava goldið skuld Havnar kommunu til eitt óvæntað lágt støði, men eisini teir gloyma at siga okkum prísin, ið er ein kommuna, sum á týðandi økjum átti at verið í undantaksstøðu! Í grein í bløðunum herfyri – nevnd Býráð ella bíðiráð – havi eg víst á ta neyðstøðu, ið bæði børn, sjúk, familjur og eldri eru í í dag – just tí at teir, í annars skilagóðu royndum sínum at minka um skuldina, gloymdu at raðfesta tað neyðuga fremst!

Hugsa um títt egna húsarhald

Einfalt dømi frá egnum húsarhaldi vísir hetta best. Velji eg at brúka megin-partin av inntøkuni til at minka um skuldina, so vil, hvussu hugalig minkaða skuldarbyrðin enn kennist, hetta fáa fylgir fyri onnur øki í dagliga degnum. Pengingur fer at mangla til vidlíkahald, presónliga røkt, tað, ið krevst til børnini v.m. v.m., alt tí at tráanin eftir skuldarfrælsi fekk okkum at gloyma raðfestingina av tí, ið hevði størri týdning.

Lyfti Miðfloksins

At eggja til og vera við til at raðfesta rætt í øllum viðurskiftum lívsins, verður altíð høvuðsendamálið í politikki Miðfloksins. Tað lyftið geva vit fegin veljarum okkara, bæði á bygd og í bý.

GRÍMA

Johan Mortensen
Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum

Tað munnu vera øll sum fegnast um tað stóra arbeiði sum sjónleikarbólkurin GRÍMA leggur úr hondum og vit skulu vera sera takksom fyri hvussu bólkurin ríkar okkum við sínum framførslum. Far okkum at sveima út um molan og sum ger lív okkara meira vert.

Vit skulu eisini fegnast um at ein úrmælingur sum Eyðun Johannesen, sum uttan iva hevur størri avbjóðingar í London, Berlin ella New York í boði er komin aftur á klettarnar. Hetta er idealisma við lýt. Tað er ótrúligt at lítla Havnin eigur ein sjónleikarhóp á altjóða støði. Latum okkum ikki gloyma hetta.

Tó er synd er at siga at Landsstýrið og Býráð hava verið líka idealistisk við at stuðla hesum fólkum. Hvussu leingi tíma hesi fólk at arbeiða undir umstøðum sum ikki eru nøktandi?

Hesi listarfólk skulu ikki sindra síni kreativu evni við at ganga biddaragongd hjá bureakratiskum ignorantum, men skulu hava tær neyðugu, attraktivu fíggjarumstøðurnar at virka undir.

Tjóðveldisflokkurin í komandi Býráði vil stuðla sjónleikinum, tað er sikkurt og vist.



Fjørðuvegurin má koma nú

John Sigurd Joensen
Valevni á Javnaðarlistanum í Klaksvík

Sambært íbúgvaratal rokni eg við, at Klaksvík eru flest bilar og hartil ferðsla.

Í Klaksvík eru fleiri bilar pr. húsarhald. Serliga er ferðslan stór eftir Klaksvíksvegnum og norð eftir Biskupsgøtu, ja heilt norð á Kósina.

Eg haldi ikki at eg taki feil. Í samband við miðbýarætlanina, er ein sokallaður fjørðuvegur á vestursíðuni. Vegurin skal ganga frá sandinum og út á keiina. Mær vitandi hevur býráðið keypt neyst upp í hesum sambandi. Nú haldi eg at tað er tíð uppá, at hesin vegurin verður gjørdur. Sum sagt, er so nógv ferðsla eftir Klaksvíksvegnum, at t.d. fríggjadag er næstan ikki framkomandi. Um vit gjørdu fjørðuvegin hevði hetta lætt nógv um tað nógvu ferðsluna eftir Klaksvíksvegnum.

Ein loysn hevði verið at gjørt vegirnar einsrættaðar, soleiðis at um tú skal úteftir skal tú eftir fjørðuvegnum, ella eisini umvent. Við góðum vilja finna vit út av tí, hvønn veg ferðslkan skal fara. Hetta vil eg arbeiða fyri.

Gott val.

Ferðslan í »gomlu« býarpørtunum

Inga Foldbo Hjallnafoss
Valevni hjá Sjálvsstýrisflokkinum

Umhvørvið og vegirnir í hesum íbúðarøkjum vóru hvørki planlagdir ella gjørdir til ta nógvu og tungu ferðslu, ið vit hava í dag.

Ferðslan í Vesturbýnum er beinleiðis vandamikil fyri tey, ið ikki eru í bili. Síðani Marknagilsvegurin var stongdur fyri ferðslu, er ferðslan gjøgnum býin økt heilt nógv. Tað eru tó ongi tiltøk gjørd at betra um ella tryggja viðurskiftini hjá teimum, ið eru til gongu ella á súklu. Tað vildi verið uppá sítt pláss at gjørt fótgangarafeltið ella sett upp ávaringar á fleiri støðum. Til dømis er Svalbards-/Grønlandsvegurin smalur, har er vánaligt sýnið – bæði hjá bilum og fólki, ið skal yvir um vegin. Hesi viðurskifti vóru ikki for góð til ferðsluna í forvegin.

Umstøðurnar í einum íbúðarøki skulu vera soleiðis, at børn hava trygg spæliviðurskifti og tryggan veg til skúla, og tey eldru eiga at kunna hætta sær yvir um vegin, hóast sjónin ella hoyrnin er niðursett og gongdin vánalig. Hetta má vera galdandi til dagligt, og eisini tá ið arbeitt verður uppá veganetið.

Viðurskiftini í høvuðsstaðarøkinum mugu tillagast soleiðis, at tað er pláss fyri øðrum enn bilunum og teimum koyrandi. Hesum vilja vit arbeiða fyri.

gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

Tín framtí› armøguleiki liggur á Tvøroyri

Pauli Einarsson
Trongisvágur,
valevni hjá
javna›arflokkinum

Tvøroyri er eitt sta› sum hevur nógv av tí, sum skal til fyri at fólk skal trívast, men naka› manglar tó enn. So um tú hevur vilja og áræ›i, so eru møguleikarnir gó›ir á Tvøroyri.

Arbei›s- og útbúgvingarmøguleikar

Statistikkurin vísir at arbei›sloysi› er líti› á Tvøroyri. Hetta merkir tó ikki, at ta› er nokk av arbei›i til øll, tí nógv fluttu í kreppuárunum, sum fegin vilja koma heim aftur, men tíverri er í minna lagi av arbei›i til tey sum nú er. Harafturat fer mest sum allur ungdómurin a›rar sta›ir at fáa sær teoretiska útbúgving ella í læru. Til tey sum hava hægri útbúgving, hava vit líti› og onki at bjó›a, men ta› for›ar teimum ikki, at byrja naka› n‡tt sjálvi, tá karmar ver›a lagdir fyri gó›um møguleikum.

So er spurningurin: Hvussu fáa vit meiri virksemi, nú vit eru bundin til at hava hægsta skatt í landinum, samstundis sum avtalan vi› Landsbankan minkar um møguleikan hjá Tvøroyrar kommunu at gera nakrar stórvegis íløgur tey næstu árini.

Sethúsa- og ídna›arpolitikkur

Landst‡ri› gevur heldur ikki Tvøroyrar kommunu teir stóru møguleikarnar, so leingi teir bókstaviliga ganga eftir or›unum: Tann sum hevur nógv, skal fáa meira og tann sum einki hevur, honum skal vera tiki› frá.

Tí má eitt samla› komandi b‡rá› saman vi› øllum gó›um kreftum syrgja fyri, at verandi vinna fær gó›ar umstø›ur at arbei›a undir og at møguleiki ver›ur fyri fleiri n‡ggjum vinnumøguleikum. Ta› er ikki politikkurin í sær sjálvum sum skapar arbei›splássini, men hann hjálpir til, vi› t.d. vi› at vísa á bílig grundøkir, sum liggja væl fyri til alt slag av virksemi.

Vísast kann á, at kostna›urin fyri eitt vanligt sethús írokna› grundstykki á Tvøroyri, kostar umlei› ta› sama sum grundøki› áleina kostar í Tórshavn.

Hvørjir møguleikar eru framyvir

Fyri at fáa tøkan kapital í kommununa má inntøkan vaksa samstundis sum føstu útrei›slurnar mugu skerast ni›ur. Ein máti at minka um føstu útrei›slurnar kundi veri›, at allar kommunur í oynni fáa sær felags umsiting av tí sum í dag ver›ur gjørt a›rasta›ni. Sum eitt dømi kundi ein felags stovnur vi› verkfrø›ingum, arkitektum, grannsko›an og advokati, hjálpt bæ›i kommunum og vinnulívi í oynni vi› flest øllum dagligum uppgávum. Hetta hev›i helst skori› útrei›slurnar nógv ni›ur vi› ta›, at hesi fólk ver›a sett í fast starv, og hava sítt dagliga arbei›i her, í sta›in fyri at vit sum í dag, fer›ast nor›uryvir vi› hvørjum smátingi og gjalda høgt tímagjald, umframt fer›a- og uppihaldsútrei›slur. Harafturat vildu hesi somu fólkini goldi› sín skatt í oynni í sta›in fyri a›ra sta›ni.

Vi› at hava eina felags umsiting vildi møguleikin fyri at fingi› a›ra umsiting sum í dag, sæ› vi› eygunum hjá mi›fyrisitingini, »náttúrliga« liggur í Havnini, haft møguleika at flutt su›ur.

Eitt anna› dømi um setan av stovnum, er gransking innan aling og fyribyrging av fiskajúkum. Henda gransking liggur náttúrliga undir einum stovni sum Heilsufrø›iliga Starvstovan, men harvi› er ta› ikki sagt, at kanningin ver›ur best gjørd á Debesartrø› ella í Kollafjør›i sum skjótt ver›ur ein patrur av Havnini. Nei handa gransking og st‡ring kundi eins væl ligi› á Tvøroyri, um politiskur vilji var til tess, tí vit vita, at fleiri yngri fólk úr oynni hava útbúgving á hesum øki, men bara kunnu fáa starv í Føroyum, um tey flyta til Havnar ella øki› har í nánd. Hetta er ein skeiv gongd, og tí má hon vendast nú á›renn eisini hesin møguleikin gleppur okkum úr hondum. Inntøkurnar kunnu bara vaksa vi› at meiri virksemi kemur ígongd. Ta› er ynskiligt at hava fleiri sløg av virkjum á Tvøroyri, tí arbei›i› á fiskavirkjunum er alt ov óstø›ugt til, at bæ›i ma›ur og kona kunnu satsa uppá inntøkur frá einum og sama virki. Tá i› ongin fiskur er á virkinum, so er onki arbei›i og harvi› ongin inntøka. Tí mugu vit hava fleiri bein at standa á vi› at fáa anna› slag av virksemi ígongd afturat. Vit bjó›a øllum ígongdsetarum hjartaliga vælkomnar at virka á Tvøroyri.

Kollafjør›ur - Havnin

Hans Biskopstø
valevni hjá
Fólkaflokkinum

Vit ynskja kollfir› ingum vælkomnum upp í Havnina!

At hugsa sær, Havnin, sum einafer› hev›i mark móti Hoyvík, fer nú eftir ársskifti› at fáa mark móti Hósvík.

Her eru stórir møguleikar skaptir í mi›sta›arøkinum.

Havnarlagi› í Kollafir›i gevur pláss fyri vinnuligum endamálum, so sum kryvjivirki og nú frystihotel til aling og a›ra vinnu. Her nørast arbei›spláss.

Og tá i› gróti› úr undirsjóvartunlinum er koyrt á sjógvin í Kollafir›i, tá ver›ur Kollafjar›ar havn ikki til at kenna aftur, og tá fer Kollafjør›ur at gera seg galdandi í frálandsvinnuni.

Á samfer›sluøkinum er Signabøur ringast fyri. Ein heilur b‡lingur er komin afturat, uttan at naka› er gjørt vi› vegakervi›, sum er einspora›ur vegur uttan gongubreyt.

Hetta riggar ikki, men tíbetur sær ta› nú út til, at gongd fer at koma á til at loysa hetta mál. Fyrireikingar eru gjørdar til at broyta svingi› á Oyrareingjum, so vónandi byrjar vegarbei›i› beinan vegin.

Her kann ikki bí›ast longur. Koyrivegur vi› gongubreyt yvir Dalá og út á Signabø má gerast sum skjótast.

Hetta er eitt ynski, sum tey, i› har búgva, hava gjørt vart vi› í fleiri ár.

Havnarlagi› á Signabø, sum uttan iva eisini ver›ur útbygt vi› tunnilsgróti, fer sum ídna›arøki beinan vegin at krevja, at vegurin, sum annars longu nú er projektera›ur, ver›ur gjørdur frá ídna›arøkinum til tunnilsvegin oman fyri Oyrareingir.

Vi› hesi bygging fer at bera til at lei›a trailarafer›sluna uttan um bygt øki og harvi› tryggari fer›sluvi›urskifti.

Fólkaflokkurin hevur sum mál at virka fyri, at vinnulívi› – bæ›i á sjógvi og landi – fær bestu livimøguleikar og trivna›.

Eldrapolitikkur í Tórshavnar kommunu

Meta C. Palle
Valevni fyri
javna›arflokkin



Ein av teimum tingum, eg kundi hugsa› mær at arbeitt vi› sum b‡rá›spolitikkari er eldrapolitikkur. Ta› skal vera ein sjálvfylgja at tú hevur møguleika fyri at ver›a ansa› tá i› tú er óhjálpin. Á›renn tú nær so langt skal tú hava møguleika at velja um tú vil á eitt røktarheim, samb‡li›, ellisheim, ella vera heima, ta› sum er ta› rætta til tín.

Velur tú at vera heima skal tú hava møguleika fyri at fólk koma heim til tín og veita tænastur, so sum at taka bló›roynd, ta› kann gerast heima og ikki úti á Ambulatoriinum og onnur slík tilbo›.

Hvat tú velur skal ta› vera fólkfólk sum ansar tær. Í dag hevur man fólk ti› tí røttu útbúgvingini til tann tørvin, i› krevst.

Heilsubótar-mi›stø›

Hans Biskopstø
Valevni hjá
Fólkaflokkinum

Fyri einum ári sí›ani var hugskot frammi um slíka stø› inni á Sundi.

Frá aldagamlari tí› vita menn um, at tey mineralir, sum finnast í sjógvi, eru lekjandi.

Fyrr var eisini vanligt at n‡ta sjógv í heimará›um til at lekja sjúkur av ymiskum slagi, so sum giktsjúkur, hú›sjúkur o.a.

Gomlu rómverjarnir brúktu – og Mi›alhavslondini brúka tann dag í dag – ba›stovu vi› heitum sjógvi til at bøta um heilsuna.

At øki› inni á Sundi er áhugavert, kemst av, at har liggur motorverki› hjá S.E.V. Og um ta› tekniskt og økonomiskt letur seg gera at n‡ta spill- ella avlopshitan frá verkinum til upphiting av ba›i vi› heitum streymasjógvi og gosba›i, so eru karmar skaptir fyri eini heilsubótarmi›stø›, sum antin kann leggjast inni á Sundi ella beint hinumegin fjør›in á Kaldbakslandinum.

Hetta er eitt stórmál, sum hugskotsstillarar og MBF arbei›a ví›ari vi›.

B‡rá›i› og S.E.V. halda máli› vera áhugavert og stu›la, at framhaldandi kanningar ver›a gjørdar. Her er talan um skilagó›a n‡tslu av spillorku til heilsubøtandi endamál.

Fólkaflokkurin stu›lar hesum tiltaki.